# Fronsku stjørnurnar

Sjálvt ikki tá Týskland vitjaði, mundi hópurin telja slíkar stjørnur sum tær, ið hesa ferð vitja á klettum okkara. Niðanfyri hava vit stutt ummæli av leikarunum í franska hópinum, sum mikukvøldið skulu takast við okkara menn á Tórsvølli.



*Tað kann vera, at Zidane ikki longur er við, men talan er kortini um stjørnur í heimsflokki, sum nú vitja Føroyar*

**Grégory Coupet, Olympique Lyon**
Tað er ikki fyrr enn seinnu árini, at Coupet veruliga hevur fingið eitt frambrot í fronskum fótbólti. Hevur sýnt sear støðug avrik fyri felag sítt nú í meira enn tvey ár, og hevur soleiðis spakuliga trýst bæði Mickael Landreau og Lionel Letizi av plássinum sum annar málverji hjá Fraklandi.

**Mickael Landreau, FC Nantes**
Var í fleiri ár næsti málverjin á franska liðnum, men hevur nú mist hetta plássið til Coupet. Skaðin, sum Fabian Barthez fekk herfyri, hevur tó aftur givið honum møguleikan á beinkinum.

**Eric Abidal, Olympique Lyon**
Varð í summar keyptur úr AS Monaco sum liður í eini størri útskifting hjá meistarunum úr Lyon. Verður av mongum mettur sum avgjørdi framtíðar verjustjørnan hjá franska landsliðnum.

**Jean-Alain Boumsong, Glasgow Rangers**
Enn eitt dømi um ein framúr fótbóltsleikara, sum er komin av fótbóltsskúlanum í Auxerre. Krútsterki verjuleikarin verður fyri tað mesta nýttur mitt fyri, har kropsstyrki og kvikleiki hansara altíð gera tað trupult at vera álopsleikari. Spælir nú við Glasgow Rangers, og spurningurin er, um skotska deildin ikki er eina tonn ov veik fyri framtíðar menning hansara.

**Patrick Evra, AS Monaco**
Enn ein av nýggju leikarunum, sum veruliga tykist hava bitið seg fastan í hópinum. Hevur av bakkinum eisini framrættaðar skyldur, og kann soleiðis væl vera viðvirkandi til trýstið, sum uttan iva verður lagt á okkara menn.

**William Gallas, Chelsea FC**
Ein sterkur verjuleikari, sum kann spæla á øllum fýra plássum í verjuni. Varð í 2001 keyptur til Chelsea, tá Ranieri skuldi byggja eitt nýtt lið upp. Og tað faktum, at hann framvegis er í hópinum, hóast milliarda íløgurnar hjá Abramovich sigur helst eisini nakað um dygdir hansara.

**Gaël Givet, AS Monaco**
Aftur ein av ungu leikarunum, men hevur hóast hetta vunnið sær fast pláss á franska liðnum. Veruliga gjøgnumbrotið fekk hann saman við upptúrinum hjá Monaco í ár, har hann var partur av eini krútsterkari verju, sum megnaði at taka at kalla alt fótboltseuropa á bóli.

**Bernard Mendy, Paris-SG**
Hóast bert 23 ára gamal er eisini Mendy vorðin mest sum fastur partur av franska liðnum. Føroyskir sjónvarpshyggjarar minnast hann kanska úr Bolton, har hann í eitt ár gjørdi nógv um seg, áðrenn leiðin aftur gekk til Fraklands. Ein sera skjótur og álopssinnaður bakkur.

**Sébastian Squillaci, AS Monaco**
Telist nú millum teir, sum hava hampuliga nógvar royndir í franska hópinum, og hann var eisini millum teir fyrstu ellivu í dystinum móti Ísrael. Enn hevur hann tó ikki vunnið sær púra fastan sess í so máta.

**Vikash Dhorasoo, AC Milan**
30 ára gamli miðvallarin varð í summar seldur til italska stórfelagið, eftir at hann annars hevur stýrimaður á miðvøllinum hjá Lyon í nøkur meistaraár. Kappingin á franska miðvøllinum er tó harðari, enn flestu aðra staðni, so hóast ivaleysu evnini sum bóltspælari, hevur hann havt trupult við at finna sær pláss í hópinum.

**Ludovic Giuly, FC Barcelona**
Var kanska størsta opinberingin í Champions-League kappingini í ár, tá hann saman við liðfeløgunum í Monaco vann seg fram til finaluna. Er nú valdur at verða ein av teimum, sum skulu endurreisa eitt nýtt dream-team í Barcelona, og sjálvur vónar hann, at hetta eisini kann verða galdandi fyri franska landsliðið.

**Claude Makelele, Chelsea FC**
Var kanska størsta orsøkin til, at Real Madrid einki vann í fjør, tí kongaliga spanska felagið fann ongan tíð rætta avloysaran til mannin, sum varð seldur til Chelsea. Er kanska ikki altíð so sjónligur í sínum spæli, men sum bóltvinnari og spælskipari telist hann millum teir allar bestu í heiminum.

**Benoit Pedretti, Olympique Marseille**
Spælskiparin hjá Olympique Marseille, og eigur hann stóran part í æruni av, at teir nú aftur eru um at finna seg fram til fronsku fótbóltstindarnar.

**Robert Pires, Arsenal FC**
Ein av stóru kreatørunum hjá Fraklandi. Er partur av fraklendingaleguni í enska Arsenal, og varð eitt nú kosin besti leikarin í bretlandi í 2002. Varð tó álvarsliga meiddur beint undan kappingarloki, og hevur síðani ikki funnið heilt sama høga støðið, tó at talan framvegis er um klassaleikara.

**Jérome Rothen, Paris-SG**
Enn ein av leikarunum, sum spælir í alsamt sterkari fronsku liguni. Er kvikur vongspælari, sum veruliga kann geva stórar trupulleikar. Kom til Paris úr Monaco, sum ikki hevði fíggjarligu styrkina til at halda fast um leikaran

**Patrick Vieira, Arsenal FC**
Franski liðskiparin, og uttan iva ein av bestu miðvallarunum í heiminum. Var fyrsti leikarin, sum Arsene Wenger keypti til Arsenal. Tá var Vieira mest sum á yvirskotslagrinum hjá Milan, og hevði eisini verið skaddur, so Arsenal rindaði ikki stórvegis fyri hann. Uttan iva ein handil, sum Milan iðrar seg um í dag.

**Djibril Cisse, Liverpool FC**
Eitt av stóru fronsku stjørnuskotunum seinnu árini, har hann hevur skorað hópatals mál fyri Auxerre. Í ár er tað tó í enska Liverpool, at Cisse ger um seg, og so er spurningurin, um hann kann lyfta arvin eftir Michael Owen.

**Thierry Henry, Arsenal FC**
Kanska størsta franska stjørnan yvirhøvur, og í eygunum hjá mongum heimsins besti leikari júst nú. Hevur ein ófatuligan skjótleika, og framúrskarandi tekniskan førleika. Kann á einum góðum degi seta mest sum allar verjuleikarar av við einum rykki, og so er spurningurin, hvørt hann hevur ein slíkan mikudagin.

**Peguy Luyindula, Olympique Marseilla**
Varð keyptur til Marseilla, tá Chelsea fór avstað við Drogba. Var undan hesum í Lyon, har hann hevur skotið hópin av málum. Er viðhvørt nakað óortodoksur í spælistíli, men effektivitetinum bilar tó sjáldan nakað.

**Louis Saha, Manchester United**
Varð kallaður inn sum eykamaður, tá David Trezeguet varð skaddur. Hevur eins og Henry ein ófatuligan skjótleika, og hevur seinastu tvey árini ment seg til ein av vandamestu álopsleikarunum í Onglandi. Eftir stóra gjøgnumbrotið við Fulham í fjør, varð hann keyptur til Manchester United.

# Nú fer Heidi til OL

**Í morgin fer eiðisgentan Heidi Andreasen saman við venjara sínum, Remi Lamhauge, av landinum. Leiðin gongur til grikska høvuðsstaðin, Athen, har Heidi skal luttaka í Paralympiaduni, ið er OL fyri brekað**

SVIMJING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Eingin ivi er um, at Heidi er eitt tað størsta føroyska ítróttarnavnið nakrantíð, og spennandi verður at síggja, um tað fer at eydnast dugnaligu eiðisgentuni at fáa eitt eins gott úrslit sum tað, ið hon fekk á paralympiaduni í Avstralia fyri fýra árum síðani, tá ið hon vann fýra silvurheiðursmerkir og eitt bronsumerki.



**Kappast í fimm greinum**
Heidi og venjari hennara, Remi Lamhauge, hava vant dúgliga undan kappingini í Athen, og nú farið verður av landinum, verður eisini steðgað á í Danmark í nakrar dagar. Her skal Heidi royna at venja í 50 metra hyli í nakrar dagar. Í Athen verður nevnliga kappast í 50 metra hyli, og tá ið eingini slíkur er her á landi, kemur tað væl við hjá Heidi og venjara hennara, at tey hava møguleika fyri at royna hetta í nakrar dagar, áðrenn leiðin gongur víðari til Athen.

Føroyska svimjigentan og venjari hennara koma til grikska høvuðsstaðin mánadagin, og ikki fyrr enn seks dagar seinni, sunnudagin 19 septembur, skal Heidi svimja sína fyrstu kapping. Hetta ger, at Heidi Andreasen hevur nakrar dagar til at venja seg við hitan og umtstøðurnar annars í grikska høvuðsstaðnum.

Í fyrstu kappingini skal eiðisgentan svimja 100 metrar firvald. Umframt hesa kapping skal Heidi Andreasen taka lut í fýra øðrum kappingum, 50 metrar frí, 100 metrar frí, 400 metrar frí og 200 metrar blandað.

Paralympiadan í Athen endar 28 septembur, og føroyskal ferðalagið verður aftur í Føroyum 30 septembur. Sosialurin fer sjálvsagt at fylgja við í, hvussu tað gongur hjá Heidi Andreasen í Grikkalandi.

# Veteranarnir rokna hetta sum tað størsta nakrantíð

**Spælararnir við flestu royndunum á landsiðnum, siga seg avgjørt roknað við, at talan verður um betri avrik og úrslit í kvøld, enn tað var í Sveis**

FØROYAR-FRAKLAND
*Jóannes Hansen*



*– Eg rokni Henry saman við kanska tveimum øðrum at vera besta álopsspælara í heiminum, sigur føroyski liðskiparin millum annað um uppgávuna mikukvøldið*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Teir báðir hava búð í rúmi saman á Hotel Føroyum seinastu dagarnar. Nú leggja teir síðstu hondina á fyrireikingarnar til uppgávuna, sum teir eru samdir í, fer at verða tann størsta nakrantíð á føroyska landsliðnum. Føroyar hava ongantíð áður spælt ímóti næstovasta liðnum á FIFA-styrkislistanum.

Eingin ivi tykist vera um, at Óli Johannesen, liðformaðurin og metmaðurin á landsliðnum, aftur hesa ferð fer at ganga fremstur inn á vøllin og harvið fer at hava Patrick Vieira undir liðini á sær. Meiri ivasamt er tað, um Jens Martin Knudsen, sum er tann einasti, ið hevur verið við heilt frá byrjanini í 1988, fer at fáa møguleikan millum stólparnar.

– Eg var fegin, tá eg fekk at vita, at eg skuldi verja málið í Sveis. Hvørja ferð eg ikki fái møguleikan, kennist tað sum vónbrot, tí eg vil fegin spæla. Jákup Mikkelsen hevur tað upp á sama máta, og soleiðis skal tað vera. Í Sveis fingu vit liðið at vita dystarmorgunin. Frammanundan høvdu vit onga ábending fingið um, hvussu tað fór at verða. Soleiðis verður tað eisini hesaferð, sigur Jens Martin Knudsen, sum hevur spælt næst flestar ferðir á landsliðnum.

*– Ert tú nøgdur við avrikið hjá tær í Sveis?*

– Vit hava hugt at dystinum. Sjálvandi er tað altíð okkurt, sum kundi havt verið betri, men fakliga eri eg ikki illa nøgdur við avrikið. Tá seks mál eru farin ígjøngum, veit eg sjálvandi, at alt kann henda innan næstu uppgávuna, staðfestir málverjin, sum hóast tapið heldur, at trýstið í Sveis ikki var so stórt, sum tað plagdi at vera fyrstu árini, tá ið Føroyar luttøku í altjóða kappingum.

– Sveisararnir vóru snildir, og mátin hjá teimum at spæla minti nógv um tann, sum Jugoslavia fleiri ferðir hevur brúkt móti okkum. Teir settu ferðina niður, lokkaðu okkum langt fram, og so eksplođeraðu teir.

**Trúgva uppá tað**
Síðani tað var greitt, at Føroyar vóru í bólki saman við Fraklandi, hevur Óli Johannesen sæð fram ímóti at spæla júst hendan dystin.

– Teir hava nógvar framúr spælarar. Eg rokni Henry saman við kanska tveimum øðrum at vera besta álopsspælara í heiminum. Nú eru teir so her. Vit hava ikki enn tosað um, hvussu vit skulu taka teir, men sjálvandi er neyðugt, at kollektivið hjá okkum riggar optimalt, og tað rokni eg við, at tað fer at gera. Vit fara ongantíð á vøllin uttan við vónini um, at tað skal bera til at fáa stig og vinna. Tað gera vit eisini hesaferð, sjálvt um styrkismunurin er so stórur, sum FIFA-listin boðar frá.

Tá ið spælararnir savnaðust aftur sunnukvøldið, var lagið eitt sindur betri, enn tað var eftir dystarlok í Sveis. Mánakvøldið vóru spælararnir í Bowling-høllini, og nú hava teir bara fokus á stóru uppgávuni í kvøld.